# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg eri takksamur fyri, at Sarah Palin stillaði upp saman við mær. Hon hugtók fólk og ger tað enn*
*(John McCain)*

# IMF aftrar seg við at veita Íslandi lán



*Á høvuðsstøðini hjá IMF bíða tey við at taka avgerð um lán til Íslands*

*Mynd: AFP*

**Upprunaliga skuldi IMF góðkenna íslendska lánið fyri átta døgum síðani, men enn er eingin góðkenning komin**

Altjóða Gjaldoyragrunnurin, IMF, aftrar seg eftir øllum at døma við at veita Íslandi eitt lán, sum skuldi fáa íslendska figgjarheimin aftur á beint eftir tær ógvusligu rembingarnar í seinastuni.

Tann 24. oktober samdust IMF og íslendska stjórnin um, at grunnurin skuldi læna íslendska ríkinum 2,1 milliardir dollarar elloa einar 12 milliardir krónur. Sambært Financial Times skuldi IMF staðfesta tilsøgnina týsdagin í síðstu viku, men tað bleiv fyrst útsett til fríggjadagin og síðani til mánadagin í hesari vikuni. Men tá hendi heldur einki, og sambært bretska blaðnum er avgerðin nú útsett í óásetta tíð.

Lánið frá IMF hevur sera stóran týdning fyri íslendingar, tí fleiri lond, teirra millum Norðurlond, hava boðað frá, at tey fara ikki at viðvirka til bjargingarætlanina, fyrr enn nevndin í IMF hevur góðkent lánið frá grunninum til Íslands og eina ætlan um, hvussu íslendski figgjarheimurin skal endurreisast.

Íslendingar hava róð framundir, at tað eru bretar, sum liggja í buktini. Sagt verður, at bretar royna forða fyri, at IMF tekur avgerð, fyrr enn bretar og íslendingar eru komnir ásamt um, hvussu verður við pengunum, sum bretar áttu í teimum íslendsku netbankunum, sum fóru av knóranum. Men bretska stjórnin hevur avsannað, at tað er hon, sum liggur í buktini.

# Russland sinnað at sleppa sínum rakettætlanum

**Vilja amerikanararnir sleppa sínum rakettverjuætlanum í Póllandi, er Russland sinnað at sleppa sínum rakettærtlanum**



*Sergej Lavrov er russiskur uttanríkisráðharri*

*Mynd: Polfoto*

Herfyri segði russiski uttanríkisráðharrin, Sergej Lavrov, at Russland fer at seta nakrar stuttberandi rakettir av slagnum Iskander upp í Kaliningrad sum svar upp á avgerðina hjá Bush-stjórnini at seta ein part av teirri amerikonsku rakettverjuskipan upp í Póllandi.

Men í gjár segði Lavrov, at Russland er sinnað at sleppa ætlanini um rakettir í Kaliningrad. Tó ikki treytaleyst.

-Okkara forseti hevur gjørt púra greitt, at verður amerikanska ætlanin í Póllandi framd í verki, sleppa vit ikki undan at seta Iskander-rakettir upp í Kaliningrad. Men vit seta ongar rakettir upp har, uttan so at amerikanska ætlanin verður veruleiki, segði russiski uttanríkisráðharrin sambært Reuters.

Hernaðarserfrøðingar siga, at verða Iskander-rakettir settar upp í Kaliningrad, kunnu tær raka útgerðina, sum amerikanarar ætla at seta upp nærhendis polska býnum Gdansk. Serfrøðingarnir halda, at Russland hevur longukjarnorkurakettir í Kaliningrad.



*Fólk í túsundatali søgdu tí kenda skipinum farvæl*

*Mynd: Polfoto*

# Drotningin farin seinasta túrin

**Heimskenda ferðamannaskipið Queen Elizabeth II er farin á sína seinastu ferð. Ferðin byrjaði í gjárkvøldið, tá Queen Elizabeth II fór úr Southampton í Bretlandi við kós ímóti Dubai í Miðeystri, har skipið skal umbyggjast til eitt flótandi hotell**

Fleiri túsund fólk vóru komin saman á havnarlagnum í Southampton at siga tí kenda skipinum farvæl. Umleið 1.700 ferðafólk eru við á teirri seinastu ferðini, og eftirspurningurin hevur verið sera stórur, hóast tann dýrasta kahúttin kostar meiri enn 28.000 bretsk pund ella góðar 255.000 krónur.

Queen Elizabeth II kemur eftir ætlanini til Dubai tann 26. november.

**STUTT SAGT**

## Palin gevur Bush skyldina

Sarah Palin, sum var varaforsetavelvni hjá republikanarunum á valinum í USA fyri átta døgum síðani, at politikkurin hjá George W. Bush, forseta og stjórn hanssra gjørdu, at John McCain og hon taptu valið.

-Eg haldi, at nógvir veljarar hava hugsað um tíðina tey seinastu árini, tá teir skuldu taka støðu. Fleiri munnu hava spurt, hví tey skuldu halda fram við republikanarunum, sum tey seinastu átta árini hava givið tí almenna 10 trilliónir dollarar í skuld, sigur Sarah Palin í Anchorage Daily News, sum er tíðindasending hjá KTUU Channel 2, sum er sjónvarpsstøð í heimstati hennara Alaska.

Hon heldur, at nógvir veljarar hava eisini spurt, hvussu USA kundi gera fleiri hernaðarlig mistøk, meðan republikanararnir sótu við ræðið, og at fólk tí vildu hava okkurt annað, sum var langt burturi frá verandi stjórnini og hennara politikki.

Amerikanskir fjølmiðlar hava dúgliga gitt, um Sarah Palin man ætla sær at gerast forsetavalevni hjá republikanarunum seinni, men sjálv vil hon einki siga um tað.

## Medvedev vil leingja valskeiðið

Russiski forsetin, Dmitrij Medvedev, hevur lagt uppskot fyri tjóðartingið í Moskva um at leingja valskeiðið hjá russiska forsetanum. Tað skrivar Reuters úr russiska høvuðsstaðnum.

Medvedev segði í síðstu viku, at hann umhugsaði at leggja fram uppskot um at leingja valskeiðið hjá forsetaembætinum úr fýra í seks ár. Grundgevingin er, at so fær forsetin betri tíð til at fáa sín politikk framdan í verki.

Russiska stýrisskipanin sigur, at forsetin kann ikki veljast meiri enn tvær ferðir. Sum er merkir tað átta ár, men fær Medvedev meiriluta fyri sínum uppskoti, verður tað 12 ár í framtíðini.